# Blákrossheimið

# Ársfrágreiðing 2013

Lynggøta 12
FR 100-Tórshavn
www.blakross.fo
t-post:blakrossheimid@blakross.fo

# Innihald

Innihald ..... 2
Um stovnin ..... 3
Nevndin ..... 3
Starvsfólk ..... 3
Játtan ..... 3
Rakstur ..... 4
Samstarv ..... 4
Viðgerð á Blákrossheiminum ..... 4
Eftirviðgerð ..... 5
Viðgerð – býtt eftir slagi ..... 5
Viðgerð - býtt eftir aldri ..... 6
Ung í viðgerð ..... 7
Viðgerð - býtt eftir kyni ..... 8
Viðgerð - býtt eftir hvussu ofta fólk hava verið í viðgerð ..... 9
Ambulant viðgerð ..... 10
Familjuskeið ..... 11
Ymisk hagtøl frá Blákrossheiminum ..... 12
Framtíðarútlit ..... 13

## Um stovnin

Blákrossheimið varð sett á stovn av Bláa Krossi Føroya í 1984, og tá var pláss fyri fimm búfólkum. Tilboðið varð víðkað til 15 búpláss í 1987, og hevur Føroya Landsstýri stuðlað rakstrinum øll árini. Frá og við 2003 er hetta broytt til, at Landsstýrið letur játtan til rakstur til Blákrossheimið. Í samband við umleggingar av viðgerðini hevur Blákrossheimið í dag 12 pláss, umframt ambulanta viðgerð.

## Nevndin

Í nevndini fyri Blákrossheimið sita trý umboð.
Frants Jensen, Fuglafirði, aðalskrivari í Bláa Krossi Føroya, er formaður; Alfred Olsen, løgtingsmaður, Saltnes, er næstformaður, og Anna Hentze, lærari, Søldarfirði, er skrivari.

## Starvsfólk

Tað eru 9,5 fulltíðarstørv á Blákrossheiminum. Talan er um leiðara, deildarsjúkrarøktarfrøðing, sálarfrøðing, sálarviðgerða, rúsevnisviðgerða, familjuviðgerða og onnur starvsfólk. Eisini eru lækni og prestur fast knýttir at viðgerðini, men er hesir ikki taldir við í uppgerðini av fulltíðarstarvsfólkum.

## Játtan

Á fíggjarlógini fyri 2013 fekk Blákrossheimið óbroytta rakstrarjáttan áljóðandi kr. 5.125 tkr. Raksturin av Blákrossheiminum varð 233.291 kr. dýrari enn játtaða upphæddin á fíggjarlógini fyri 2013. Orsøkirnar til at játtanin ikki helt, eru fleiri, sjúka hjá starvsfólki og broyting í starvsfólkabólkinum, er ein partur, men harafturat hevur í fleiri ár verið trupult at fingið játtanina at halda, uttan at gera serlig inntriv í kjarnu arbeiðið.

## Rakstur

Ein støðugur trupulleiki, sum Blákrossheimið er í, er, at alt størri partur av játtanini fer til lønir, orsakað av sáttmálabundnum lønarhækkingum, og tessvegna verður minni til aðrar útreiðslur. Niðanfyri sæst lutfalsliga prosentbýtið millum lønir og annan rakstur seinastu tíggju árini.

| | 2004 | 2005 | 2006 | 2007 | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 | 2013 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Lønir** | 71% | 71% | 73% | 72% | 73% | 73,4% | 76,8% | 72% | 73% | 75% |
| **Aðrar. útr.** | 29% | 29% | 27% | 28% | 27% | 26,6% | 23,2% | 28% | 27% | 25% |

Fyri at betra um úrslitið fyri 2013, vóru neyðug tiltøk sett í verk, sum skerdu viðgerðina seinnu helvt av árinum. Vit spardu burtur næstan alt tímalønt arbeiði, hetta gjørdi, at vit bert tóku 10 búfólk inn í senn, og harumframt høvdu vit ikki orku til sama ambulanta tilboðið, sum vit vanliga hava. Eisini stongdu vit seks vikur um summarið og 11 dagar um jólini. Hesi tiltøk vóru sera óheppin fyri okkara viðskiftafólk. Vit høvdu støðugt bíðilista, sum vit ikki megnaðu at gera nakað við. Aftur í ár var eitt familjuskeið.

## Samstarv

Blákrossheimið hevur eitt gott og umfatandi samstarv við partar, sum á ymiskum økjum hava við brúkararnar at gera. Eitt nú er samstarv við Kriminalforsorgina í sambandi við rúsdrekkakoyring og aðrar dómar, har fólk verða dømd at vera edrú. Eisini er samstarv við kommunalar sosialar myndugleikar ella tá ið talan er um barnaverndarmál. Viðmerkjast skal, at samstarvið við barnaverndirnar kring landið er økt. Blákrossheimið bjóðar viðgerð í arrestini, og varð hetta tilboðið nýtt í 2012, men ikki í 2013.

## Viðgerð á Blákrossheiminum

Viðgerðin á Blákrossheiminum er skipað sum heildarviðgerð, og inniheldur hendan avrúsing, dag- ella samdøgur- og eftirviðgerð. Hetta er høvuðsvirksemið hjá stovninum. Umframt hetta hevur Blákrossheimið, sum liður í viðgerðini, tilboð um ambulanta viðgerð og familjuviðgerð.

Viðgerðin á Blákrossheiminum hevur til endamáls at arbeiða fram ímóti fullkomnum fráhald frá rúsevnum, t.e. at vit viðgera fólk, ið hava mist tamarhaldið á nýtsluni. Hetta gera vit við í fyrstu atløgu at avrúsa, samstundis sum vit arbeiða í bólkum við m.a. motivatión, rúsfunktión, broytingarætlan og upplýsing. Í aðru atløgu fylgja brúkararnir viðgerðarætlan, sum verður gjøgnumførd við arbeiði í bólkum og einasamtalum, har vit seta fokus á tað, hin einstaki hevur brúk fyri. Mátin vit arbeiða uppá er sosialpedagogisk og psykologisk viðgerð, og nýta vit t. d. eg-styrkjandi-, ACT- og kognitivaviðgerð.

## Eftirviðgerð

Síðan 2011 eru vit miðvíst byrjað at arbeiða meira við heildarviðgerð, soleiðis at skilja, at fólk, eftir at tey hava verið í viðgerð, arbeiða víðari í skipaðum bólkum í eftirviðgerð, í upp til tvey ár frameftir. Tá møguleiki er fyri at arbeiða víðari í bólki, er lættari at halda seg til upprunaligu avgerðina um at broyta lívsstíl. Eftirviðgerðartilboði er í trimum pørtum. Fyrst koma fólk aftur ein dag um vikuna í fýra vikur, í ein skipaðan bólk. Eftir um leið hálvt ár verða tey bjóða til eftiviðgerðarskeið, hetta er bólkur, sum er eitt kvøld um vikuna í 15 vikur saman við sálarfrøðingi. Øll, sum hava verið í viðgerð  hava møguleika at koma á vikuligan eftirviðgerðar fund. Í Tórshavn er fundurin á Blákrossheiminum kl. 19:00 til 20:00 hvørt hóskvøld, í Runavík er hann í hølunum hjá Bláa Krossi Føroya mánakvøld somu tíð.

## Viðgerð – býtt eftir slagi

Ein munandi broyting er farin fram seinastu árini, tá talan er um hvat slag av misnýtslu, í sambandi við at fólk leita sær hjálp á Blákrossheiminum. Rúsdrekka er tó framvegis nógv tann størsti trupulleikin. Mynstrið er eisini, at í Føroyum hava vit so at siga ikki misnýtslu, har bert talan er um hash og narkotisk evni; rúsdrekka er altíð ein partur av misnýtsluni. 63% av teimum, sum vóru í viðgerð í 2013, høvdu trupulleikar við rúsdrekka, í mun til 57% í 2012. Hini 37% vóru fólk, har rúsdrekka var blandað saman við øðrum rúsevnum. Í 2012 var hetta talið 43%.
Misnýtslan av alkoholi og tablettum hevur verið svingandi seinastu árini. Í 2010 vóru 23% av viðgerðunum fyri hetta slagið av misnýtslu, men bæði í 2011 og 2012 hevur tað ligið um 12% og í 2013 er tað hakkað upp í 13%. Størstu sveiggini eru í misnýtslumynstrunum, ið verða bólkað sum

alkohol, tablettir, hash og narkotisk evni. Í 2009 var hetta 33% av viðgerðunum; í 2010 var tað minkað niður á 23%, í 2011 var tað aftur hækkað til 30%, í 2012 var tað 31% og nú í 2013 er tað 24% av viðgerðunum.

Sum áður sagt, so vísa royndir frá innleggingum á Blákrossheiminum, at næstan eingin ”bara” nýtir t.d. hash ella onnur narkotisk evni í Føroyum. Ein grund til, at næstan eingin nýtir eitt einstakt evni, er væntandi, at tilgongdin av rúsevnum er óstøðug. Hetta, at næstan eingin heldur seg til eitt einstakt evni, er helst eitt serføroyskt fyribrigdi í mun til tey londini, vit samanbera okkum við, og hetta kann vera orsakað av avmarkaðari tilgongd av rúsevnum.

Á Blákrossheiminum hava vit sæð eina gongd, sum tykist at hava stabiliserað seg, har ein størri partur av viðgerðunum er fyri misnýtslu av hashi og/ella narkotiskum evnum saman við alkoholi og tablettum. Henda gongd eigur at vera tikin í størsta álvara.




## Viðgerð - býtt eftir aldri

Tey flestu, sum leita sær hjálp fyri misnýtslu á Blákrossheiminum eru í aldrinum 30-60 ár, og hevur hetta verið soleiðis nógv tey seinastu árini. Í 2013 vóru 71% av teimum, ið leitaðu sær hjálp, í

hesum aldursbólki. Hetta er ein vøkstur í mun til 2012, tá ið hesi taldu 70% av viðskiftafólkunum, og í 2011, tá ið hesi vóru 69%, men hetta er ein minking í mun til 2008 og 2009, tá ið tey vóru ávikavist 73% og 72% av samlaða hópinum. Miðalaldurin á teimum, sum vóru í viðgerð í 2013 var 47 ár. Seinastu árini hevur hann ligið millum 43 og 48 ár.




## Ung í viðgerð

Blákrossheimið hevur hesi seinastu árini sæð ein vøkstur í talinum av yngri fólki, ið leita sær viðgerð. Í 2013 vóru 12 fólk millum 18 og 30 ár í viðgerð, í mun 16 fólk í 2012, og er hetta ein minking, men tó ein øking frá 2006, tá einans 4 fólk í hesum aldursbólki vóru í viðgerð. Í prosentum er gongdin frá 2006 til 2011 soleiðis, at í 2006 umboðaði aldursbólkurin 2% av teimum, sum komu í viðgerð, í 2008 umboðaðu tey 10%, í 2009 heili 19%, í 2010 16%, og í 2011 12%. Í 2012 vaks prosentparturin til 14%, meðan tað í 2013 fall til 10%. Hóast talið er lægri enn bæði í 2009, 2010 og 2012, so hevur tað í fleiri ár ligið omanfyri 10%, og vísir hetta, eftir okkara fatan, at broytingar eru farnar fram í misnýtslumynstrinum. Hetta er eisini ein trupulleiki, ið má takast í álvara.

Tey ungu nýta í størri mun sterkaru rúsevnini, sum t.d. hash, amfetamin, kokain, og onnur narkotisk evni saman við rúsdrekka. Hetta ger, at tað aloftast er truplari at fáast við, og tekur longri tíð at

viðgera. Tey ungu kenna seg rímiliga væl á Blákrossheiminum, men tað kann tó verða trupult hjá teimum at vera saman við "gomlum" rúsdrekkamisnýtarum. Av hesi orsøk eru tað nøkur, sum fáa tilboð um ambulanta viðgerð, tí vit vita, at døgntilboðið ikki altíð er nøktandi fyri tey. Ynskiligt hevði tí verið, um eitt serstakt viðgerðartilboð var fyri ung, og hava vit eisini gjørt vart við hetta hjá Almannamálaráðnum og Heilsumálaráðnum. Viðmerkjast skal, at fleiri av teimum ungu verða send av landinum at fáa viðgerð, og hevði tað eftir okkara tykki verið munandi betri fyri tey, og bíligari fyri samfelagið, at tey fingu viðgerð í Føroyum.

Umráðandi er eisini, at tey ungu koma í viðgerð skjótast gjørligt, áðrenn trupulleikin verður ov stórur og veruliga fær fastatøkur á teimum. Besta loysnin er kortini at gera meira við upplýsing og fyribyrging millum børn og ung. Lættari er at fyribyrgja enn at hjálpa.

## Viðgerð - býtt eftir kyni

Býtið millum kynini vísir, at størsti parturin av teimum, ið leita sær hjálp á Blákrossheiminum eru menn. Hyggja vit at tølunum fyri øll tey, ið hava verið í samband við stovnin, bæði sum innlegging og ambulant, síggja vit, at millum 2006 og 2011 hava menninir verið millum 74% og 86% av hesum. Í 2012 telja menninir 72%. Í 2006 vóru 86% av viðskiftafólkunum menn, og í 2013 er talið økt uppaftur til 80%. Tilsvarandi vøkstur í prosentum er at finna hjá kvinnunum.
Tá ið talan er um hjálp til familjur, er býtið millum kynini, at meginparturin av teimum, sum leitaðu sær hjálp í 2013, vóru kvinnur. 86% av hesum vóru kvinnur, meðan 14% vóru menn.



## Viðgerð - býtt eftir hvussu ofta fólk hava verið í viðgerð

Tá ið alt er tikið við, eru 179 fólk skrásett, at hava fingið viðgerð í fjør, og er hetta nakað fleiri enn í 2012, tá 159 vóru. Av hesum 179 vóru 42 persónar í ambulantari rúsviðgerð, og 8 persónar í viðgerð sum avvarðandi. Innleggingarnar vóru 122 í tali. Miðaltalið fyri, hvussu nógv fólk vóru inni pr. dag í 2013, var 10,2 fólk, og er hetta nakað minni enn árið fyri, tá miðaltalið var 11,5. Í mun til undanfarin ár er talið lægri, og grundin til hesa gongd er, at størri dentur er lagdur á ambulanta viðgerð, og at Blákrossheimið orsakað av manglandi játtan tók færri búfólk inn seinru helvt av árinum. Miðal innleggingartíðin í 2013 var 26,2 dagar. Í 2004 var innleggingartíðin 18 dagar í miðal, og í árunum 2007-2012 var hon millum 23 og 33 dagar í miðal. Hendan gongdin er í tráð við ætlan okkara at tryggja eina betri viðgerð. Hugsanin er, at ein haldgóð viðgerð krevur longri tíð. Harafturat krevja tey, ið nýta fleiri rúsevni, longri tíð í viðgerð.

Tølini fyri undanfarna ár vísa, at rættiliga fáir persónar koma afturvendandi í viðgerð. 70% av teimum vóru bara inni eina ferð. 19% vóru inni tvær ferðir, 7% tríggjar ferðir og so eru tað tey afturvendandi 4%, ið vóru inni fýra ferðir ella oftari. Í hesum sambandi kann viðmerkjast, at talan ikki er um nakra veruliga viðgerð fyri hesi, sum koma triðju ferð ella oftari; heldur er talan um avrúsing í nakrar dagar.

Í 2013 fingu 164 ymisk fólk viðgerð í mun til 147 árið fyri. Hetta er bæði innleggingar og ambulant, og her eru tey, ið Blákrossheimið hevur havt samband við fleiri ferðir í árinum, bara tald eina ferð. Til og við 2010 eru ambulantar viðgerðir skrásettar sum nýggj í viðgerð. Í samband við broytingar í viðgerðini er hátturin til skrásetingar broyttur soleiðis, at bara tey, sum ikki fyrr hava verið innløgd á Blákrossheimið, verða skrásett sum nýggj í viðgerð. Umframt tey 27, ið ikki hava verið innløgd fyrr, hava 16 fingið ambulanta viðgerð. Tað vil siga, at soleiðis sum skrásett hevur verið fyrr, eru 43, sum ikki hava fingið viðgerð áður. Samanborið við tølini undanfarin ár sæst, at hetta er ein øking, í sambandi við innlegging, í mun til 2012 har 23 ikki hava verið innløgd fyrr í mun til 27 í 2013.




## Ambulant viðgerð

Blákrossheimið hevur, sum liður í viðgerðini, tilboð um ambulanta viðgerð og eftirviðgerð á ymiskum økjum. Serliga er tað ung fólk, sum fylla nógv í hesum partinum av arbeiðinum. Harafturat eru nakrir brúkarar, ið ynskja hendan møguleikan, ið hóskar betur til familju- og arbeiðslívið. Ambulanta virksemið er niðurraðfest í 2013. Ikki tí, at vit ikki leggja dent á ambulanta viðgerð, men tí at játtanin sum áður nevnt ikki strekti til.

Millum 2008 og 2012 hevur Blákrossheimið haft samband við 45 ung í aldrinum 15 – 18 ár. Orsøkin til, at hetta talið er alsamt minkað, og Blákrossheimið ikki hevur verið í samband við ung í hesum aldri í 2013, er ikki, at trupulleikin er burtur, men at talan er um ein sera tíðarkrevjandi bólk, og at vit ikki hava havt starvsfólkaorku at viðgerða hesi. Ætlanin í 2014 er, at hesi kunna koma inn á Blákrossheimið til samtalu hjá sálarviðgerða ella sálarfrøðingi.

Um talan hevur verið um ung, sum vaksa upp í umhvørvi, har rúsdrekka og rúsevni eru ein partur av gerandisdegnum, hava vit seinastu trý árini víst til sjálvhjálparbólkar fyri ung, sum fyribyrgingararbeiði hjá Bláa Krossi Føroya hevur.

Vit hava í 2013 havt 8 familjulimir til ambulanta viðgerð og hetta er fult í tráð við okkara hugsan, at rúsmisnýtsla ávirkar alt húskið. Hetta eru færri enn í 2012, tá ið 12 avvarðandi vóru í ambulantari viðgerð.
Tveir eftirviðgerðarbólkar eru virknir, har fundir eru hvørja viku. Vit hava ætlanir um at økja hesar bólkar upp til 5 í 2014.

## Familjuskeið

Royndirnar vísa, at tað er sera týdningarmikið at taka familjuna við í sambandi við viðgerð fyri misnýtslu av rúsandi evnum, tí tá eru vit við til at broyta neiligga familjustrukturin, og harvið geva vit uppvaksandi ættarliðinum betri kor.
Blákrossheimið hevur seinastu árini miðvíst arbeitt við tilboði til familju hjá misnýtarum. Vit høvdu fyrsta skeiðið í januar 2006. Síðan tá hava millum tvey og fýra familjuskeið verið hvørt árið. Í 2013 var eitt familjuskeið, og vóru 15 fólk á familjuskeið.

Skeiðið fyri familjuna er eitt heildartilboð, har byrjað verður við trimum fylgjandi skeiðsdøgum. Ein mánað seinni verður fylgt upp við einum skeiðskvøldi, og tveir mánaðir seinni við enn einum skeiðskvøldi. At enda verða luttakararnir innkallaðir ½ ár aftaná at tey møttust fyrstu ferð. Eftir hetta kunnu luttakarar halda fram í einum sjálvhjálparbólki. Vit hava frá 2011 roynt at broytt tað soleiðis, at skeiðið verður partvís lagt um vikuskiftið og um kvøldið. Hetta sær út til at vera væl dámt.
Nakrir sjálvarhjálparbólkar fyri familjur eru sprotnir burtur úr skeiðunum, og halda hesi sjálv sambandið sínámillum.

## Ymisk hagtøl frá Blákrossheiminum

| Heiti | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 | 2013 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Tal av fólki, ið hava fingið viðgerð | 155 | 175 | 198 | 182 | 159 | 179 |
| Ymisk fólk í rúsviðgerð | 106 | 126 | 143 | 136 | 147 | 164 |
| Nýggj fólk í rúsviðgerð | 44 | 59 | 72 | (53) | (58) | (43) |
| Tal av innleggingum | | | | 116 | 112 | 122 |
| Nýggj fólk innløgd í rúsviðgerð | | | | 22 | 23 | 27 |
| Nýggj fólk í ambulantari viðgerð | | | | | | 16 |
| Tal av ambulantum í rúsviðgerð | | 19 | 44 | 31 | 35 | 42 |
| Tal av familju í amb. viðgerð | | | | 36 | 12 | 8 |
| Røktardagar í alt | 4359 | 4742 | 4675 | 3300 | 3702 | 3194 |
| Røktardagar miðal | 28 | 27 | 23,6 | 28,5 | 33 | 26,2 |
| Miðal búfólk pr. dag | 13,2 | 14,4 | 14,1 | 11 | 11,5 | 10,2 |
| Menn | 77% | 82% | 75% | 74% | 72% | 80% |
| Kvinnur | 23% | 18% | 25% | 26% | 28% | 20% |
| Miðalaldur | 48 ár | 43 ár | 43 ár | 45 ár | 44 ár | 47 ár |
| Luttakarar á familjuskeiði | 30 | 29 | 12 | 21 | 13 | 15 |

Frágreiðing til tølini:

**Tal av fólki, ið hava fingið viðgerð:** Øll tey, ið hava verið í sambandi við Blákrossheimið og viðgerðarar har. Tey, ið hava verið í viðgerð fleiri ferðir, eru tald eina ferð fyri hvørja ferð. Við í hesum talinum eru “Tal av innleggingum”, “Tal av ambulantum í rúsviðgerð” og “Tal av avvarðandi í amb. viðgerð”.

**Ymisk fólk í viðgerð:** Tal fyri, hvussu nógv ymisk fólk hava fingið viðgerð á Blákrossheiminum, bæði sum innlegging og ambulant.

**Nýggj fólk til viðgerð:** Bæði tey, ið hava fingið viðgerð ambulant, og tey, ið hava verið innløgd á Blákrossheiminum, men eru ikki skrásett fyrr. Hesin bólkurin er nú býttur sundur og lagdur í

"Nýggj fólk innløgd í rúsviðgerð" og "Nýggj fólk í ambulantari viðgerð", og tískil stendur talið í klombrum.

**Tal av innleggingum:** Tal av fólki, ið hava verið innløgd til viðgerð á Blákrossheiminum. Hetta er eitt samlað tal fyri innleggingar, t.v.s. at hædd ikki er tikin fyri, at onkur hevur verið innlagdur fleiri ferðir.

**Nýggj fólk innløgd í rúsviðgerð:** Tal av fólki, ið ikki hava verið innløgd á Blákrossheimið til viðgerð fyrr.

**Nýggj fólk í ambulantari viðgerð:** Tal av fólki, ið ikki hava verið í viðgerð á Blákrossheimið.

**Tal av ambulantum í rúsviðgerð:** Hvussu nógv hava fingið viðgerð ambulant.

**Tal av familjulimum í amb. viðgerð:** Hvussu nógvir familjulimir hava fingið ambulanta hjálp á Blákrossheiminum.

## Framtíðarútlit

Í september mánaði 2012 varð undirskrivaður sáttmáli um at byggja nýggjan bygning til at húsa viðgerðini. Byrjað varð at byggja í januar mánaði 2013, og klárt verður at flyta í nýggja bygningin á Nesi á sumri 2014. Við nýggjum viðgerðarheimi verða karmarnir um viðgerðina munandi betri.

Arbeiðið við at lýsa okkara virðis- og viðgerðargrundarlag er liðugt, og vit eru farin undir at lýsa innihaldið nágreiniliga í viðgerðarpørtunum. Arbeiðið við at fáa eina skipaða eftirmeting av viðgerðini er í gongd. Við skipaðari eftirmeting verður støðugt bøtt um viðgerðina, og verða vit soleiðis betri til at málrætta viðgerðina til hvønn einstakan, og tí er ætlanin eisini at gera eina effektkanning av viðgerðini á Blákrossheiminum.
Blákrossheimið og Heilsumálaráðið hava undirskrivað mál- og avrikssáttmála, og arbeitt verður eftir hesum.

Vinaliga og við vón um framhaldandi gott samstarv
Tórshavn, tann 21.03.2014

Olga Magnussen
leiðari